## Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| Dagur: 27.mai<br>Tíð:kl 16.00 – 17.30 | Luttakarar: Allan,Vivian, Bergun, Jóhan, Súsanna, Bjørghild og Marjun<br><br>Ikki møtt: |
|---|---|

| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
|---|---|---|---|
| 1. | Undirskriving av fundarfrásøgn (gerðabók) frá seinasta fundi (A) | Seinasta fundarfrásøgnin varð undirskrivað. | AM |
| 2. | Broytinga í fólkaskúlalógini | Ein broyting er, at skúladagatalið fer frá 198 niður á 193 fyri næmingar, men lærarnir hava framvegis eina arbeiðstíð á 1800 tímar. Hetta viðførir at lærarnir hava eina viku í alt at gera eftirmetingar av farna skúlaári og fyrireiking við byrjan av níggja skúlaárinum. Hetta verður sett í verk frá 1.aug 2019, við tillaðing.<br>Ilt er at skilja, hví summarferian skuldi gerast longri. Hví fingu næmingarnir ikki heldur fingu eina vetraferiu?Nú er møgulligt at skerja hvønn árgang við tveimum tímum, soleiðis at skúlavikan gerst í mesta lagi 2 tímar stytri fyri hvønn árgang.<br>Ætlanin er at bøta um tvílæraraskipanina í grunddeildini so møguleikarnir fyri næmingalagaðari undirvísing gerast enn betur.<br>Miðdeildin hevur verið hugsa at seta inn við floksins tíma og skeið í tøkni.<br>Onkur helt fyri at næmingar eru ov illa fyri tøkninilga tá ið teir komu á hádeild og at hetta átti at verið gjørt<br>Hádeildin verður hugt at møguleikum um tað ber til at minka um tímatalið, við atliti til próvtøkur o.a.<br>Tað er ikki heilt greitt, hvussu hesir skerdu tímarnir skulu brúkast. Í grunddeildini fara at mangla tímar í tvílæraraskipanini og kann tað verða skilagott at fáa ta skipanina at virka betur.<br>Floksins tími hevur verið uppá tal sum sera tiltrongdur, fyri at hava ein tíma har tað veruliga verður tikið fatur í tí sum rørir seg millum næmingarnar.<br>Miðdeild og eitt tøknitilboð, sum skeið, er ein ætlan til at brynja næmingar betur til framtíðar krøv á hesum øki. | MH |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | Onkur helt fyri at næmingarnir vór ov vánaligir at brúka telduna, tá teir komu í 7.flokk, tá knappliga alt skuldi gerast á teldu.<br>Um hádeildin skal skerjast verður tað eitt sindur avbjóðandi um fakligu krøvini ikki minka samsvarandi. Hádeildin hevði havt tørv á einum floksins tíma.<br>Ilt er at siga nakað endaligt fyrr enn tímatalið fyriliggur, tí tað skal loysast á besta hátt innan fyri givnu karmanar. | |
| 3. | Status við klædningi, vindeygum og taki. | | Tað er ikki hent so nógv meira í málunum. Kommunana er um at fáa avgreitt klædningin og vindeyguini, so at farast kann undir umvælingar arbeiði. Ilt er at siga ítøkiliga nær farið verður í gongd, men kanska einaferð í heyst.<br>Takið er kanska ikki so umfatandi sum hildið var av fyrstan tíð. Fíggjarviðurskiftini í hesum máli eru ikki heilt avgreidd enn, men kemur væntandi uppá pláss í næstum. | MH |
| 4. | Nýggja bussleiðin | | Næmingar sum koma frá hinumegin ánna hava verri umstøður at koma niðan við bussi.<br>Tey koyra við 3´arnum men mugu av við rundkoyringina, áðrenn hann fer niðan í AB vøllin.Tey standa síðan og bíða eftir 1´aranum niðanfyri Hebron, uttan bussskýli eina góða løtu. Best hevði verið um 3´arin fór niðan á skúlan beina leið túrin fyri kl 8. Vit fara at heita á kommununa við einum skrivi at fáa hesa broyting í lag. | MH |
| 5. | Setanir | | Tað dregur út tímarnir til komandi ár eru ikki komnir enn, tí verða setanir o.a. nógv seinkað.<br><br>Væntandi eru 2 føst størv og tíðaravmarkaði størv til komandi skúlaár.<br><br>Onkur av foreldrunum helt at tað var minni heppið, at foreldrini ikki vóru kunnaði um at t.d. ein flokslærari sat í einum tíðaravmarkaðum starvi, best var at tey vóru kunnaði um slag av setan. | |
| 6 | Kunning | | Trivnaðarkanningin var løgd fram í dag, vit kendu enn ikki úrslitið fyri okkara skúla. Undir framløguni vóru tey kunnaði um, at tølini sóu betur út fyri stóru skúlarnar enn fyri teir smáu. Vit vænta at fáa tølini fyri okkara skúla seinni ´hetta skúlaárið<br><br>Landsroyndin har fyriliggur úrslitið fyri næming og flokkarnar, men enn hava vit ikki fingið lands miðal, tá | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | tað fyriliggur senda vit úrslitið út til foreldrini. Vit nýta teldupostadressuna hjá mamuni, tí hon liggur fyrst fyri,<br><br>Próvtøkurnar eru farnar í gongd. Vóru inni í Látrinum og vitjaðu.<br><br>Tosaðu um seinasta skúladag.<br><br><br><br>Hetta var seinasti skúlastýrisfundur fyri summarfrítíðina, | |